# ítróttur

Nr. 42 • týsdagur • 28. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Føroyar vunnu stórsigur

**Landsliðsvenjarin roynir ymsar uppstillingar, nú Føroyar spæla venjingardystir í USA. Í venjingardystinum ímóti chilenskum 2. deildarliði spældu høgrabeintir spælarar í vinstru síðu frá dystarbyrjan**



*Føroyar vunnu 7-0 í venjingardysti í USA um vikuskiftið. Ætlanin var at spæla ímóti einum sterkum liði úr Honduras, men liðið gav avboð til dystin, og tí gjørdist mótstøðan nógv veikari*


FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Føroyska fótbóltslandsliðið vann ein sjáldsaman stórsigur, tá ið liðið um vikuskiftið spældi venjinardyst ímóti einum 2. deildarliði úr Chile. Úrslitið gjørdist 7-0 til Føroyar, og hetta var annar sigurin á rað í venjingardystum í USA.

Eftir evstamark her á blaðnum í dag, skuldu Føroyar royna seg ímóti einum sterkum liði úr Salt Lake City í triðja dystinum á USA-ferðini.

Dysturin ímóti chilenska liðnum kom seint í lag. Orsøkin var, FSF hevði avtalað ein dyst vi eitt lið úr Honduras, sum hevði vunnið steypakappingina í fjør, men liðið meldaði avboð til dystin dagin fyri.

FSF royndi at finna eitt annað lið at spæla ímóti, og liðið úr Chile var klárt at taka dystin upp ímóti føroyska liðnum.

## Ov veik mótstøða

Trupulleikin við dystinum var bara tann, at chilenska liðið var ikki serliga gott, og í seinna hálvleiki fekk føroyska liðið sera lætt spæl, tí teir úr Chile kláraðu ikki at fylgja við tá.

Fyrsta málið hjá Føroyum kom ikki fyrr enn eftir ein góðan hálva tíma, og til ta tíð hevði chilenska liðið vart manniliga. So hvørt sum dysturin leið, gekk orkan hjá teimum undan, og í seinna hálvleiki høvdu føroyingar ov lætt spæl. Seks mál komu afturat, og so var stórsigurin veruleiki.

Málskjúttar vóru Andrew av Fløtum 2, Jónhard Frederiksberg, Fróði Benjaminsen, Hans Pauli Samuelsen, Heðin á Lakjuni og Hjalgrím Elttør.

## Nógvar royndir

Dystirnir í USA hava givið landsliðsvenjaranum Jógvani Martini Olsen møguleikan at royna ymsar nýggjar spælarar og nýggjar uppstillingar. Í dystinum ímóti chilenska liðnum spældu til dømis høgrabeintir spælarar í vinstru síðu.

Christian Høgni Jacobsen var vinstri bakkur og Bergur Midjord var kantspælari í vinstru. Hann noyddist tíðliga út, og so kom Hans Pauli Samuelsen á vøllin fyri hann.

Óli Johannesen og Atli Danielsen spældu í miðverjuni allan dystin, og Jákup á Borg royndi seg sum høgra bakk. Rógvi Jacobsen var aftur miðframherji, tó uttan at skora í hesum dystinum.

Í hálvleiksssteðginum skifti landsliðsvenjaran nógvar spælarar út, og tað skal neyvan leggjast ov nógv í hesar dystirnar, tí teir eru til at royna ymsar spælarar á ymiskum plássum.

# Knørrur fær postin umborð

**P/F Postverk Føroya og Róðrarfelagið Knørrur skrivaðu mánadagin undir tvey ára stuðulsavtalu. Við hesum verður P/F Postverk Føroya høvuðsstuðul felagsins fram til 2008**


KAPPRÓÐUR
*Tíðindaskriv*


Róðrarfelagið Knørrur er eitt róðrarfelag í menning og er farið at brynja seg til framtíðina. Við nýggju stuðulsavtaluni við P/F Postverk Føroya er gøtan greidd tey næstu árini.

## Vit stuðla einum treystum og framskygdum felagi

Bergur í Garði, stjóri í P/F Postverki Føroya sigur, at Postverkið sær Róðrarfelagið Knørr sum eitt spennandi róðrarfelag. Fólkið hevur rætta viljan og hugburðin til at menna seg til eitt sterkt og gott ítróttarfelag. Og tí menningini vil Postverk Føroya fegið stuðla. At tey hava bygt sær hetta felagið upp burturúr at kalla ongum, ber boð um treysti og framskygni. Kunnu vit verða við til at hjálpa ítróttinum á henda hátt, so gera vit tað fegin, sigur Bergur í Garði. At kapppróður er tjóðarítróttur føroyinga ger tað bara uppaftur hugaligari.




*Bergur í Garði, stjóri í Postverkinum, og Eivy Olsen, næstforkvinna í Róðrarfelagnum Knørri*

## Gott fyri felagið

Eivy Olsen, næstforkvinna í Róðrarfelagnum Knørri, sigur, at tey eru sera glað fyri avtaluna. Hon gevur okkum betri stundir at hugsa um sjálvt felagið, og tað fer sum frá líður at geva róðrarfólkinum betri umstøður at virka í. Vit fáa stutt sagt meiri pening at arbeiða við. Vit fáa eitt nýtt fimmmannafar í summar, og tíggjumannafarið er heldur ikki langt burtur. Tað sær gott út hjá okkum í so máta. Størsta ynski okkara er sjálvandi eitt neyst til limir og rógvarar. Tað fer at geva okkum nógv betri møguleikar enn nú, bæði ítróttarliga og sosialt. Vit hava nakað av peningi á kistubotninum og eru mestsum klár at byggja. Vit bíða bara eftir, at myndugleikarnir vísa okkum á eitt hóskandi pláss, so seta vit spakan í, sigur Eivy. Og hon leggur afturat, at eingin ivi skal verða um, at Róðrarfelagið Knørrur fer at gerast eitt sterkt kapppróðrarfelag, sum er fult á hædd við tey bestu í landinum.

## Ingi aftur uttanfyri

Mánakvøldið spældi eykaliðið hjá Birmingham dyst í móti eykaliðnum hjá Everton. Dysturin endaði málleysur, hóast Birmingham hevði yvirvág í spæli og kundi fingið okkurt málið. Føroyski landsliðsspælarin Ingi Højsted var tikin út til eykaliðið, men hann sæt á beinkinum allar 90 minuttirnar. Hetta er annar dysturin á rað, at Ingi ikki er á vøllinum, tá ið eykaliðið spælir dyst. Fleiri av royndu spælarunum hjá Birmingham spældu við í hesum dystinum – millum annað Kuqi, Jamie Clapham og Stephen Clemence.

## GÍ roynir ungarskan málmann

GÍ leitar eftir nýggjum málmanni, og mikudagin kemur ein 32 ára gamal málmaður úr Ungarn til Gøtu at royndarvenja. GÍ brúkti fleiri málmenn í fjør, og fyrr í ár høvdu teir ein bretskan málmann til royndarvenjing, uttan at nakað spurdist burtur úr tí. Geza Turi, sum nú skal royna seg í Gøtu, hevur spælt fótbólt á hægsta stigi í Ungarn.

## HB-kvinnur spæla aftur

Nú eru kvinnurnar hjá HB farnar at spæla fótbólt aftur. Seinastu tvey kappingarárinum hevur HB ikki havt nakað kvinnulið, tí undirtøkan fyri kvinnufótbóltinum hevur verið ov lítil í felagnum. Nú verður ein roynd gjørd at fáa kvinnurnar í gongd aftur, og tað tykist hava eydanst. HB hevur teknað kvinnulið til kapipngina hjá FSF, og um vikuskiftið spældi HB-kvinnur sín fyrsta dyst í tvey. Tað var ein venjingardystur ímóti AB, sum HB vann 3-2. Málskjúttar hjá HB vóru Annika Thomsen, Barbara á Dunga og Kartin Bærentsen.

## Landsdystir á skránni

Nógvir landsdystir verða spældir í kvøld og í annaðkvøld. Hetta eru venjingardystir undan HM-endaspælinum í Týsklandi í summar. Millum teir mongu dystirnar, sum eru á skránni, kunnu nevnast: Ísrael-Danmark, Finland-Kazakhstan, Ísland-Trinidad og Tobago, Senegal-Noreg, Írland-Svøríki, Italia-Týskland, Ongland-Uruguay og Russland-Brasil.